# Kunnu brúka meira fólk

**Á Tavuni í Leirvík er ríkiligt av arbeiði, men ov lítið av fólki. Hóast søkt hevur verið eftir arbeiðsfólki gjøgnum arbeiðsávísingina, hevur tað ikki givið úrslit, sigur virkisleiðarin**

FÓLKATROT
*Edvard Joensen*

**Leirvík:** Á fiskavirkinum Tavuni í Leirvík er meira arbeiði, enn fólk er til. Tað merkir nógva yvirtíð til teirra, sum vilja tað. Men hóast søkt hevur verið eftir arbeiðsfólki, hevur tað ikki givið úrslit. Sama støðan er á øðrum arbeiðsplássum í bygdini.

Ingvard Joensen, virkisleiðari á Tavuni, sigur, at tey hava brúk fyri umleið 60 fólkum til arbeiðis á virkinum, um full manning skal vera. Tá verður roknað við tveimum vaktum.

Men tað standa ikki vegir til at fáa so nógv fólk her á landi, og tí hava tey leitað uttanlands eftir arbeiðskraft. Tað arbeiða fimm polakkar á Tavuni í løtuni, sigur Ingvard Joensen. Og hann letur væl at. Tað er dugnaligt fólk, sigur hann.

Hóast søkt hevur verið eftir arbeiðsfólki gjøgnum arbeiðsávísingina, hevur tað ikki nyttað nakað. Tað fæst ikki fólk, greiðir Ingvard Joensen frá. Og hann veit at siga frá øðrum virki í Leirvík, sum hevur sama trupulleikan.

–Støðan líkist henni í áttatiárunum, tá ivaleyst var av arbeiði aðrastaðni enn í fiskivinnuni, butursæð frá tí, at tá var eitt virki í bygdini, meðan tey í dag eru trý. Men fólkatalið er tað sama, sigur virkisleiðarin á Tavuni.

At tað kortini ber til, kemst fyri ein stóran part av, at fólk arbeiða nógv yvir. Summi arbeiða upp móti tveimum fullum vaktum, sigur hann og undrast á, hvussu tey orka tað. Í stóran mun eru tað kvinnur, sum umframt arbeiðið á Tavuni eisini hava hús og heim at passa.

Síðan eina viku undan ólavsøku hava tey meira og minni arbeitt hvørja nátt á Tavuni, letur virkisleiðarin at.

Í løtuni arbeiða tey gulllaks á Tavuni, og hann krevur ikki fult so nógv fólk, sum tey skulu hava, tá tey eitt nøu arbeiða upsa um veturin, So tá er trupulleikin enn størri, vísir Ingvard Joensen á.

Fýra trolarar fiska gulllaks undir Føroyum. Polarhav og Stjørnan avreiða regluliga til Tavuna, eins og Eysturbúgvin plagar at gera, meðan Vesturbúgvin fyri tað mesta leggur upp í Miðvági, har eisini ein gulllaksalinja er, sigur hann.

Vesturbúgvin hevur tó landað onkuntíð í Leirvík, tá virkið í Miðvági er stongt um summarið, sigur Ingvard Joensen.

Á Tavuni plaga tey ikki at steingja vegna summarfrí, men halda afturfyri eina rímiliga langa jólaferiu, sigur hann.

Trolararnir landaðu gulllaks fyrstu ferð í ár um miðan apríl, og fara helst at halda á til einaferð út í september ella oktober. Í fjør var komið nakað út í oktober, áðrenn teir góvust við gulllaksafiskiskapinum, sigur Ingvard Joensen, virkisleiðari á Tavuni í Leirvík.



*Á Tavuni í Leirvík er meira arbeiði, enn fólk er til. Neyðugt hevur verið at fáa útlendska arbeiðskraft*

*Mynd: Edvard Joensen*

# Friðaligt á Fiskamarknaðinum

**Á Fiskamarknaði Føroya á Toftum er friðaligt í løtuni. Nakað av útróðrarfiski, og fiskur frá trolbátunum á Landleiðini er tað, sum selt verður**

FISKAMARKNAÐUR
*Edvard Joensen*

**Á Toftum:** Tað er friðaligt á Fiskamarknaði Føroya í løtuni. Samstundis sum fleiri virki eru í summarfrí, liggja eisini fleiri av skipunum, og arbeiðsfólkini á Fiskamarknaðinum er eisini fleiri farin í summarfrí.

Tað er fyri tað mesta trolfiskur av landleiðini, sum landaður verður til og seldur á uppboðssøluni hjá fiskamarknaði Føroya á Toftum, verður sagt av Fiskamarknaðinum.

Hetta er tíðin, tá smærru trolbátarnir trola innan fyri tólv fjórðingar, og tað eru í høvuðsheitinum teir, sum lata nakað av týdningi til Fiskamarknaðin í løtuni, verður sagt. Tó kemur nakað av útróðrarfiski upp á land og verður hann so eisini seldur á uppboði hjá Fiskamarknaðinum.

Trolbátarnir fáa mest flatfisk, verður látið at á Toftum. Reyðsprøku og kanska mest tungu, siga tey.

Útróðri er nakað av, hóast fleiri virki ligja still, og týsdagin komu umleið 60 tons av útróðrarfiski til Fiskamarknaðin, verður sagt á Toftum.

Línuskipini hava hinvegin ikki landað í longri tíð. Men tað er einki óvanligt í tí. Fiskiárið er liðugt, tá august mánaði er farin, og fleiri teirra hava ikki meira at fara eftir. Eisini nýta menn høvi til at pussa upp, meðan virkini liggja still, so alt kann passast hvørt eftir øðrum.

Heldur ikki trolararnir hava verið serliga dúgligir á marknaðinum í seinastuni, siga tey á Toftum. Har verður hildið, at teir kanska selja nakað væl beinleiðis til virkini.

Men aftur her kemur, at fleiri virki hava ligið still vegna summarfrí, so trolaranir hava kanska í ávísan mun eisini ligið, verður mett.

Á Fiskamarknaðinum verður sagt, at hendan tíðin um ólavsøkuleitið er tann slakasta soleiðis á hvørjum ári. Og tað hava tey so eisini tikið við læru av á Fiskamarkanðinum og lagt sínar egnu summerferiur eftir tí.

Men tá nú fer at líða út í august mánaða, fer fiskivinnan aftur at vakna, og so verður vónandi aftur farið í gongd við fullari ferð, verður sagt.



*Tað er linligt á Fiskamarknaðinum á Toftum um dagarnar. Stórur partur av flotanum liggur, men trolbátarnir á landleiðini og útróðrarbátarnir eru kortini í drift, verður sagt av Fiskamarknaði Føroya á Toftum*

*Mynd: Edvard Joensen*



Ung á sjónleikarstevnu:

# Fingu nógv burturúr

**Tólv ungdómar eru júst afturkomnir av ferð í Svøríki, har tey hava luttikið á eini sjónleikarstevnu. Tey hava verið á fleiri skeiðum um ymisk evni innan sjónleikin, umframt at tey framførdu ein leik á stevnuni**

SJÓNLEIKUR
*Stefan í Skorini*

Ungdómsleikbólkurin frá Dramaverkstaðnum hjá Hjørdis Johansen í Havn hevur júst verið á sjónleikaraferð í Svøríki.

Leikbólkurin var við á eini sjónleikarastevnu í Västerås í Svøríki, har sjónleikarbólkar úr øllum norðurlondum og teimum baltisku londunum luttóku. Henda stevnan var fyri bæði vaksin og ung.

Føroyski leikbólkurin, sum taldi tólv ung fólk, framførdi leikin »Speedy Gonzales setur ferð á«. Hesin leikurin hevur verið sýndur á gamla Meiarínum fleiri ferðir í fjørsummar.



*Hesin leikbólkurin frá Dramaverkstaðnum hjá Hjørdis Johansen í Havn hevur júst verið í Svøríki á sjónleikarstevnu, og tey hava fingið nógv burturúr*

### Á skeið um sjónleik

Leikararnir og leikstjórin Hjørdis Johansen eru sera væl nøgd við ferðina hjá teimum í Svøríki.

– Vit hava fingið nógv burturúr hesi ferðini. Vit hava verið á fleiri skeiðum og sæð nógvar sjónleikir, sum hava givið okkum nógv, sigur Hjørdis Johansen.

Stevnan varð skipað soleiðis, at fyrireikararnir høvdu skipað fyri fleiri skeiðum á stevnuni. Leikararnir kundu so fara á skeiðini og fáa lærdóm um sjónleik. Á skeiðunum vóru lærarar, sum hava professionellar royndir, tí var tað sera áhugavert hjá leikarunum at vera við á hesum skeiðum.

Skeiðini snúðu seg um ymisk evni so sum at nýta røddina á palli, at dansa og at nýta kropsmál í leikum.

Ein stórur partur av stevnuni snúði seg eisini um at hyggja eftir leikum og at kjakast um teir. Á henda hátt komu leikararnir nógv runt í sjónleikaraumhvørvinum.

Hóast bara tveir ungdómsleikbólkar vóru við á stevnuni, so høvdu fleiri av hinum bólkunum ungar limir, sum eisini spældu sjónleik saman við teimum vaksnu.

### Framførdu einaferð

Leikurin var bara framførdur eina ferð, og tað var mánadagin 5. august, hóast sjónleikararnir vóru í Svøríki í sjey dagar. Orsøkin til tað var, at nógv annað var á skránni enn at spæla sjónleik.

Hesin leikurin er leysliga umsettur av Hjørdis Johansen, og tey ungu hava síðani skapt eftir egnum ynski saman við leikstjóranum.

Leikurin snýr seg um misnýtslu av narkotika og hvussu hesi ungu fólkini sjálvi royna at sleppa úr haftinum.

# Eykajáttan til oljuskattadeildina

**Landsstýrismaðurin við fíggjarmálum hevur biðið um eina eykajáttan á 300.000, ið skal nýtast til at innrætta ein bygning í Klaksvík, sum m.a. skal hýsa oljuskattadeildini**

EYKAJÁTTAN
*Stefan í Skorini*



*Karsten Hansen hevur biðið um eina eykajáttan á 300.000 krónur at innrætta ein bygning, ið skal hýsa oljuskattadeildini*

Tey trý starvsfólkini á oljuskattadeildini undir fíggjarmálastýrinum fara í næstum at flyta inn í nýkeypta bygningin í Klaksvík.

Landsstýrismaðurin við fíggjarmálum hevur biðið løgtingið um eina eykajáttan á 300.000 krónur. Hesin peningur skal nýtast til projektering av innrættingini av bygninginum, sum liggur niðanfyri sjúkrahúsið á Klaksvíksvegi, har málingahandilin helt til fyrr.

Tað er ikki bara oljuskattadeildin, sum skal halda til í bygninginum, men eisini Almannastovan og Toll- og skattstovan fara at hava sítt virksemi í bygninginum.

### Innrættast

Bygningurin skal tó innrættast, áðrenn allir hesir stovnarnir kunnu flyta inn. Almannastovan er longu farin at virka í bygninginum, meðan oljuskattadeildin fer at flyta inn í næstum. Skrivstovurnar eru tó innrættaðar.

Toll og skattstovan er enn í bygninginum á Stongunum, men flytingin verður framd einaferð seinni í heyst.

Karsten Hansen heldur, at tað er umráðandi hjá einum býi sum Klaksvík at hava annað enn fiskiídnaðin at halla seg til, og hann vónar, at tey eisini fáa eitt akademiskt umhvørvi á staðnum. Endamálið upprunaliga var at flyta ein part av almennu umsitingini úr miðstaðarøkinum.

Bygningurin varð upprunaliga keyptur fyri 5,7 milliónir krónur, og hann fer at standa í 10-11 milliónum krónum, tá hann er innrættaður.

# Springarar í Nólsoyarfirði

SPRINGARAR
*Stefan í Skorini*

Mikudagin stutt fyri middag hildu fólk seg síggja grind í Nólsoyarfirði. Talan var tó bert um springarar. Hetta var ein lítil flokkur av springarum, sum menn hildu vera grind at byrja við. Sýslumaðurin gav tó boð um at lata springararnar sleppa.

Fleiri bátar hildu leiðina úr Havn og út ímóti flokkinum, sum var staddur uppi við Hoyvíkshólm. Men tá tað gjørdist teimum greitt, at talan bara var um ein lítlan flokk av springarum, vendu flestu teirra við aftur.